**UTTAN ÚR HEIMI**

## Velja útlendskar havnir

Eftirlitið við vørum, sum verða fluttar til Danmarkar, er vorðið so umfatandi og tíðarkrevjandi, at fleiri danskir innflytarar hava valt at nýta havnir í útlandinum heldur enn tær donsku.

Tað eru serliga fiskur og fiskaúrdráttir úr londum uttan fyri ES, sum donsku innflytararnir velja at taka í land í útlendskum havnum. Tað kemur fram í einari kanning, sum felagið hjá donsku fiska- og matvørufyritøkunum hevur gjørt, og sum umfatar 32 fyritøkur.

Kanningin vísir, at 15 av teimum 32 fyritøkunum nýta tær útlendsku havnirnar, tá tær innflyta fisk og fiskavørur úr londum uttan fyri ES, og 12 aðrar fyritøkur siga, at tær umhugsa at gera tað sama. Kanningin vísir eisini, at donsku innflytararnir nýta serliga havnina í Hamburg.

## Eingin kanning enn

Nógv bendir á, at tann ætlaða kanningin av vanlukkuni við ferjuni "Scandinavian Star" verður útsett.

Roknað hevur verið við, at kanningin skuldi byrja í ár, men sambært norska blaðnum Aftenposten fer danski ríkisadvokaturin neyvan at taka avgerð um at seta kanningina í verk fyrr enn næsta ár. Hetta kemst av, at danska stjórnin nýliga gjørdi av, at danska skattavaldið skal upp í kanningina. Endamálið við hesum er at vita, um teir, sum veruliga áttu ferjuna, eru drignir til svars.

Hjá ríkisadvokatinum verður sagt, at skattavaldi verður neyvan klárt við sínari kanning fyrr enn einaferð í heyst, og tí kann tann ríkisadvokaturin neyvan taka ta endaligu avgerðina fyrr enn einaferð aftan á ársskiftið, skrivar Aftenposten.

## Vandamikil bakteria

Heita veðrið seinastu árini hevur havt við sær, at ein vandamikil tropisk bakteria er farin at gera vart við fram við svensku vesturstrondini, og kanningar vísa, at bakterian tekur seg longur og longur norður.

Bakterian eitur "vibrio vulnificus" og er av somu bakteriuætt sum eitt nú kolera, og vanliga heldur hon til í teimum tropisku økjunum, men tað lýggja veðrið norðanfyri tey seinnu árini hevur gjørt, at bakterian eftir øllum at døma eisini klárar seg her norðuri. Sviar varnaðust bakteriuna fyrstu ferð í 1994. Tá varð hon funnin har suðuri við svensku vesturstrondina, men seinastu árini er hon ko longur og longur norður.

Á sjúkrahúsinum í Malmø verður sagt, at fimta hvørt fólk, sum kemur í samband við bakteriuna, fær blóðeitran. Svensku myndugleikarnir siga, at seinastu árini er í meðal eitt fólk deytt um árið av bakteriuni.

## Ætlaðu at ræna Taylor

Keldur í uppreistrarherinum í Liberia hava avdúkað, at eitt bretskt-amerikanskt felag hevur boðið sær til at senda leiguhermenn til landið at ræna liberiska forsetan, Charles Taylor. Sambært keldunum skuldu leiguhermenninir lata krígsbrotsmannadómstólinum hjá ST fáa Taylor, sum er skuldsettur fyri krígsbrotsverk.

Ein talsmaður hjá bretsk-amerikanska felagnum Northbridge Services Group váttar fyri bretska blaðnum The Independent, at felagið hevur havt samband við liberisku uppreistrarrørsluna LURD. Sambært talsmanninum var felagið til reiðar at senda 2.000 leiguhermenn til Liberia at taka Taylor.

Sambært The Independent snýr málið seg ikki bert um ætlanina at ræna Charles Taylor. Blaðið veit at siga, at bæði bretsku myndugleikarnir og amerikanska FBI eru farin undir at kanna, um felagsskapurin kann hava sent LURD vápn. Er tað so, er hetta brot á eina ST-samtykt, sum bannar øllum vápnaflutningi til Liberia.

# Veðurlagið í Sahara hevur flutt seg longur norður



*Tann nógvi hitin og turkurin hava elvt til skógareldar nógvastaðni í Suðurevropa. Her roynir ein portugisisk tyrla at sløkkja ein skógareld*

*Mynd: Reuters*

**Italskir veðurlagsgranskarar halda seg nú vita orsøkina til tann nógva hitan og turkin í Evropa. Frágreiðingin er, at veðurlagið í Sahara-oyðimørkini er komið norður um Miðjarðarhavið**

VEÐUR
*Árni Joensen*

Italsku granskararnir eru komnir eftir, at tann nógvi hitin og turkurin í Evropa í seinastuni stavar frá Sahara-oyðimørkini, og teir siga tað ikki vera óhugsandi, at hitin og turkurin fara at standa við langt út í september.

- Tað tykist, sum at oyðimarkarveðrið hevur flutt seg norður til okkara, sigur Giampero Maracchi á veðurstovninum í Firenze við blaðið la Republica.

Italsku granskararnir vísa á, at sunnan fyri Sahara hevur tað regnað munandi meiri í summar enn vanligt. Giampero Maracchi sigur, at tað tykist, sum at ekvator hevur flutt seg 20 stig norðureftir. Úrslitið er áhaldandi hátrýst yvir Miðjarðarhavinum, og tað hevur havt oyðimarkarhita við sær. Í Rom vóru 37,4 hitastig fyrrapartin hósdagin, og í Bordeaux í Fraklandi vóru 37 stig. Bæði í Eysturríki, Rumenia, Ungarn og Kekkia hava veðurmenninir mált methita í seinastuni.

Norski veðurfrøðingurin Kristin Gislefoss sigur, at metingarnar hjá italsku veðurgranskarunum eru helst rættar.

- Vit síggja, at umleið 30 stig norðan fyri ekvator er eitt breitt hátrýstøki kring alla Jørðina. Stundum flytir hetta øki seg longur norður, og so fáa vit heita luft úr Sahara norður til londini norðan fyri Miðjarðarhavið. Tað er væl hugsandi, at hetta hátrýstøki hevur flutt seg uppaftur longur norður í ár, sigur Kristin Gislafoss við blaðið Dagsavisen.

# Statoil hevur kanska funnið risastóra oljuleið

**Í Statoil hildu tey, at bara gass var at finna í Ellida-økinum í útnyrðing úr Tróndheimi, men nú er líkt til, at talan er heldur um eina risastóra oljuleið**

OLJUVINNA
*Árni Joensen*

Í Statoil vilja tey einki siga um úrslitið hjá boriskipinum "West Navigator", sum hevur borað fyri felagið í Ellida-økinum, men vælvitandi keldur siga fyri blaðnum Aftenposten, at felagið hevur funnið eina oljukeldu, sum kann vísa seg at vera ein av teimum heilt stóru.

"West Navigator" fór undir boringina tann 20. juni, og boringin verður ikki liðug fyrr enn um einar fjúrtan dagar. Undan leitingini vildu jarðfrøðingarnir vera við, at millum 200 og 300 milliardir rúmmetrar av gassi vóru í økinum, men nú tað vísir seg at vera olja heldur enn gass, verður hildið, at talan er um millum 200 og 300 milliardir rúmmetrar av olju umframt væl av gassi.

Ellida-økið er á 1200 metra dýpi í útnyrðing úr Tróndheimi. Statoil er operatørur á økinum og eigur 30 prosent av leitingarloyvinum. Hini feløgini, sum eru uppií, eru ConocoPhilips við 10 prosentum, Norske Shell, BP og Petoro, sum eiga 20 prosent í part.

Nýggja fundið hjá Statoil kemur uttan iva norsku myndugleikunum væl við, tí herfyri kunngjørdi oljumálaráðið í Oslo, at framtíðarvánirnar í oljuvinnuni eru ikki so bjartar longur. Tað er nú heldur ikki so løgið, tí tað eru nú meiri enn tíggju ár, síðani nakað munandi fund var á norskum øki.





*Hvítt brim, ein trækaj, og vit hóma bátar langt burtur og so óendaliga luftin, kraftfull skíggj, myrk dramatisk og grá*

# Havið, sólin, býurin, skipini, menniskjað og Turner

**Ein av klassikarunum, innan listaheimin, er bretin Turner (1775-1851). Myndir hansara ávirka fólk í stóran mun enn tann dag í dag, sjálvt um hann doyði longu í 1851 – doyr eitt menniskja?**

LIST
*Øssur Johannesen*

Butternere Lake eitur ein mynd. Eg síggi – og eisini tú? – ein myrkan sjógv, ein einsamallan bát, tvey fólk eru í bátinum og eitt myrkt fjall reisur seg omanfyri sjógvin, sum er stillur. Hesi tvey fólkini njóta friðin í bátinum. Aftanfyri hómast enn størri fjøll. Tey siga einki, men liva í tøgn. Hetta er ein myrk mynd, men aftan fyri er eitt sterkt intenst kosmiskt ljós, sum hesi fólkini í lítla bátinum síggja. Á luftini er svart og grátt skíggj ella fleiri. Á fløtuni skínur gult ljós. Hendan myndin er ein samansjóðan av skuggum og ljósið. Nógv svart. Hvat er svart og hvat er grátt? Hvat er ein litur, og hvat er eitt hav, og hvat er ein mynd? Litirnir eru fáir, men klangirnir í litunum eru vakrir. Myrkir og eisini hóttandi, men í hesum hóttanum er ein friður. Men tú merkir veldigar náttúrukreftir og skugganir eru tungir, men eisini vakrir og hvør sigur, at ein skuggi ikki kann vera vakur? Hendan myndin sigur einki, eingi orð, men tagar í tøgn – hvat er tøgn?

At hesin listarmaður hevur eina djúpa sera álvarsama sál og kenslur og tankar, tað merki eg alt fyri eitt, tá ið eg síggi hesa myndina. Men eg ræðist hesa myndina, tá ið eg síggi hana – hví tað veit eg ikki – og eg havi als ikki sæð hana í veruleikanum á Tate í London, men hon er bert endurgivin í eini bók, og kortini talar hon til mín á sama hátt, sum dramatiska náttúran í Føroyum. Talar til mín. Eg dugi ikki ordiliga at seta orð á, hvat tað er, sum hendan myndin vekir innan í mær. Hendan myndin virkar ótømandi uppá meg.

Eg síggi eina aðra mynd. Seglbátar. Fólk rógva og havið er í ógvusligari rørslu. Hvítt brim, ein trækaj, og vit hóma bátar langt burtur og so óendaliga luftin, kraftfull skíggj, myrk dramatisk og grá og miðskeiðis ein ljósabláur flati, sum ein ljós vón, sum opnar seg á himni meðan sjómenninir stríðast. Listamaðurin hevur fanga stemningin – men hvat er stemningur? Turner er langt síðani »deyður«. Havið er rundan um okkum enn, og myndin talar til okkum enn. Sæð við tekniskum eygum, er myndin ótrúliga virtuos. Ikki uppá ein tóman yvirfladiskan ella grunnan hátt, men á ein nærlagdan máta, sum hann dugir at tekna. Hendan myndin fortelur okkum um stríðið hjá menniskjanum her á fold, sum tað var tá og framvegis er tað. Menniskja er undirgivið náttúruni, ella er tað øvugt? Menniskja er eisini ein náttúra innaní – men hvat er náttúra? og hvat er menniskja?

Sum Ova syngur um í fløguni »maður – glotti«: Tað er upp til hvønn einstakan at finna útav. Tað er m.a. tað, vit fáa eitt lív til at læra av øllum. Einaferð hvørvur havið, skrivar Rói